# Skatta- og avgjaldsmál avgerðir

| Mál nr.: 09-03-31-61 | Lóg: | Avgerð tikin: 27.01.2010 |
|---|---|---|

## Uppkrevjing av gjøldum


**Samandráttur:**

**Kært er um gjøld, sum kærarin er uppkravdur eftir í samband við, at kærarin innflutti eina fløgu. Skatta- og avgjaldskærunevndin hevur tikið avgerð um, at heimild er hjá TAKS at krevja tænastugjald á 30 kr. vísandi til § 1 í kunngerð nr. 7 frá 2. februar 2007 um tænastugjald í samband við tolling og umtolling, jb. § 23, stk. 2 í tolllógini, og at heimild er hjá TAKS at krevja mvg á 38 kr. vísandi til § 1 og § 27 í mvg-lógini. Avgjørt er eisini at avvísa kæruna um, at Postverkið egna vegna hevur uppkravt ymisk gjøld, tí eingin avgerð er frá TAKS hesum viðvíkjandi. Nevndin hevur tí ikki málføri at viðgera hesa kæru vísandi til § 22, stk. 1 og § 24, stk. 1 í løgtingslóg um toll- og skattafyrisiting. Talan er um eitt mál millum Posta og kæraran.**


**Avgerð:**

**Kært er um** gjøld, sum kærarin er uppkravdur eftir í samband við, at kærarin innflutti eina fløgu.

**TAKS**

TAKS upplýsir, at talan er um mvg á 38 kr. Upphæddin er 25 % av tollvirðinum, ið er 152,94 kr. Tað, vøran kostar at keypa.

Tænastugjald 30 kr. varð ásett í kunngerð nr. 7 frá 2. februar 2007 um tænastugjald í samband við tolling og umtolling. Tann kunngerðin er síðani broytt. Frá 30. mai 2009 er broyting komin í viðvíkjandi hesum viðurskiftum. Nú er ásett eitt minstamark fyri, nær ein sending skal tollroknast.

Hetta er gjørt við broyting í § 6 í tolllógini og lýst í kunngerðarblaðnum nr. 13, 2009, sum kom út 29. mai 2009. Broytingin er galdandi frá 30. mai 2009.

Tað merkir, at undantikið tolli og mvg eru sendingar, har tollvirðið ikki er meira enn 300 kr. Avgjaldsfrítøkan fevnir tó ikki um vørur, ið rinda punktgjald (rúsdrekka, kosmetikk, tubbaksvørur og góðgæti). Tænastugjaldið til TAKS uppá 30 kr. fellur eisini burtur.

Sostatt hevði rokningin, ið kærarin kærir um, einki gjald havt fyri toll, tænastugjald og ei heldur fyri mvg, um tað var í dag og vøran + fraktútreiðslur høvdu verið undir 300 kr. sambært § 6 í tolllógini.

Síðani er tað parturin á tollkortinum, ið hevur áseting:

Postverkið:

- Avgreiðslu av fráboðan fyri TAKS
- Avgreiðslu av tollrokning fyri TAKS

TAKS vil vísa á, at hesar upphæddir einki hava við TAKS at gera. TAKS er ikki móttakarin av upphæddini, men harafturímóti er tað Postverk Føroya.

**Kærarin**
Í kæru frá 3. apríl 2009 kærir kærarin tey gjøld, sum eru uppkravd í samband við innflyting av fløgu.

Sambært tollkortinum frá februar 2009 eru hesi gjøld kravd:
Postverkið:

Ómaksgjøld fyri

| | | |
|---|---|---|
| - Skundtolling/tollingaráheitan | 0 kr. | |
| - Avgreiðslu av fráboðan fyri TAKS | 24 kr. | |
| - Avgreiðslu av tollrokning fyri TAKS | 36 kr. | |
| - Mvg | 15 kr. | |
| | | 75 kr. |

TAKS:

| | | |
|---|---|---|
| Gatt-tollur | 0 kr. | |
| Punktgjald | 0 kr. | |
| Mvg | 38 kr. | |
| Tænastugjald | 30 kr. | |
| | | 68 kr. |

**Avgerð frá Skatta- og avgjaldskærunevndini**
Viðvíkjandi mvg'num á kr. 38 og tænastugjaldinum á kr. 30, sum eru uppkravd av TAKS, er spurningurin, um heimild er at uppkrevja hesi gjøld.

Viðvíkjandi tænastugjaldinum á kr. 30 er ásett í § 1 í kunngerð nr. 7 frá 2. februar 2007 um tænastugjald í samband við tolling og umtolling, at fyri sendingar, sum koma til tolløkið, skal tænastugjald á kr. 30,00 rindast til Toll- og Skattstovu Føroya fyri skráseting í post- og innflutningsskipanini. Fyri sendingar, sum eru avgjaldsfríar, skal tó einki tænastugjald rindast.

Hendan kunngerð hevur m.a. heimild í § 23, stk. 2 í løgtingslóg nr. 121 frá 23. desember 1991 um toll, sum seinast er broytt við løgtingslóg nr. 49 frá 16. mai 2006, sum ásetir, at Landsstýrismaðurin kann áseta nærri reglur um tænastugjøld í sambandi við tolling og umtolling.

Sendingin hjá kæraranum er ivaleyst skrásett í post- og innflutningsskipanini hjá TAKS, og uppkrevjingin av tænastugjaldinum hevur tí heimild í § 1 í kunngerðini um tænastugjald við tolling og umtolling. Sendingin er mvg-skyldug og kann tí ikki frítakast fyri gjaldið av tí grund, at hon er avgjaldsfrí.

Viðvíkjandi uppkrevjingini av mvg'num á kr. 38 skal viðmerkjast, at vørur, ið verða fluttar úr útlondum, eru avgjaldsskyldugar í sambandi við innflutningin, jb. § 1 og § 27 í løgtingslóg nr. 136 frá 8. september 1992 um meirvirðisgjald. Avgjaldið verður avroknað sambært reglunum í 7. kapitli í tolllógini, jb. § 27, stk. 1 í mvg-lógini. Tað framgongur av § 27, stk. 2, at avgjaldið er 25% av virðinum, sum er ásett í § 27, stk. 2.

Heimild er hjá TAKS at uppkrevja 38 kr. í mvg vísandi til hesar reglur.

Viðvíkjandi gjøldum, sum eru uppkravd av Postverkinum herundir avgreiðslugjøldum á kr. 24 og kr. 36 og mvg á kr. 15, er spurningurin, um Skatta- og avgjaldskærunevndin hevur málføri at viðgera hendan partin av kæruni.

Sambært § 22, stk. 1 í løgtingslóg nr. 169 frá 30. desember 1997 um toll- og skattafyrisiting viðger Skatta- og avgjaldskærunevndin toll-, skatta- og avgjaldskærur. Sambært § 24, stk. 1 í somu lóg ger nevndin úrskurð um kærur um tær avgerðir, økisskrivstovurnar, kommunalu skattakærunevndirnar, Stýrið ella Toll- og skattaráðið hava tikið.

Í hesum føri er talan um ómaksgjøld, sum Posta egna vegna uppkrevur av kæraranum. Talan er sostatt ikki um avgjøld, sum Posta krevur vegna TAKS, og talan er tí heldur ikki um avgerð hjá TAKS um at krevja hesi gjøld.

Tað framgongur av § 22, stk. 1 í løgtingslóg um toll- og skattafyrisiting samanhildin við § 24, stk. 1 í somu lóg, at Skatta- og avgjaldskærunevndin viðger kærur um avgerðir frá økisskrivstovunum, kommunalu skattakærunevndunum, Stýrinum ella Toll- og skattaráðnum.

Tá talan viðvíkjandi hesum gjøldum ikki er um avgerð hjá TAKS um at krevja gjøldini, kann hesin parturin av málinum ikki kærast til Skatta- og avgjaldskærunevndina.

**Skatta- og avgjaldskærunevndin hevur tikið avgerð um, at heimild er hjá TAKS at krevja tænastugjald á 30 kr. vísandi til § 1 í kunngerð nr. 7 frá 2. februar 2007 um tænastugjald í samband við tolling og umtolling, jb. § 23, stk. 2 í tolllógini, og at heimild er hjá TAKS at krevja mvg á 38 kr. vísandi til § 1 og § 27 í mvg-lógini.**

**Avgjørt er eisini at avvísa kæruna um, at Postverkið egna vegna hevur uppkravt ymisk gjøld, tí eingin avgerð er frá TAKS hesum viðvíkjandi. Nevndin hevur tí ikki málføri at viðgera hesa kæru vísandi til § 22, stk. 1 og § 24, stk. 1 í løgtingslóg um toll- og skattafyrisiting. Talan er um eitt mál millum Posta og kæraran.**

Viðmerkjst kann, at tað fyrisitingarliga er sera óheppið, at uppkrevingin hjá TAKS av avgjøldum í hesum føri ikki vísir til heimild fyri hesum gjøldum, og annars heldur ikki er grundgivin, og tí ikki lýkur tey krøv, sum eru til avgerðina eftir fyrisitingarlógini.